

*Tina og ein starvsfelagi*

hennara arbeiðspláss jú er.

Tað eru 600 danskir hermenn í hesum øki. Teirra endamál er fyrst og fremst at byggja landið upp til gagns fyri vanliga fólkið. Hetta er at gera vegir, byggja skúlar og slíkt, sum kann gera lívið hjá fólkinum lættari og betri.

Men hetta er ikki lætt, tá alt hetta er illa sæð av Taleban, sum metir slíkt virksemi at vera av tí illa.

Tað eru fleiri danskir hermenn, sum eru dripnir bæði í Irak og Afganistan. Serliga eru tað tær sokallaðu vegsíðubumburnar, sum eru so lumpisligar. Tær liggja krógvaðar fram við vegnum, og verða útloystar við fjarstýring. Vil illa til er lítið at gera.

Serliga eru talebanarnir ímóti, at skúlar verða gjørdir, har gentur eisini kunnu fáa lærdóm. Hesum eru teir so nógv ímóti, at skúlar mugu hava vaktarhald at verja næmingarnar móti Taleban. Hvussu stór fanatisman er sást í tí, sum frættist um dagarnar, at teir nýta sýru, sum teir blaka í andlitið á gentunum fyri at oyðileggja teirra útsjónd. Her er talan um ein hugburð, sum tað als ikki ber til at skilja. Eitt er at leggja eftir teimum, sum teir meta sum sínar fíggindar. Men at hevna seg inn á gentur, sum bert vilja hava vanligan skúlagang. Slíkt ber ikki til at fata.

Her er talan um eina ófatiliga kvinnukúgan. Men tað kann eisini vera trupult at fáa kvinnurnar at ganga ímóti hesum. Hóast tær ikki noyðast tað, ganga framvegis nógvar við burka, har tað bert er eitt lítið hol í slørinum hjá kvinnunum at síggja ígjøgnum.

Tina heldur, at tað sum umræður er at vinna unga ættarliðið fyri nýhugsanum. Men hetta kemur ikki av sær sjálvum.

Talebanar nýta eisini snildir fyri at vinna fólkið. Teir eiga pening, sum teir lata fólkinum fyri at fáa tey at koma í teirra part. Hetta ger tað ikki lættari.

## Royna at steðga opiumframleiðsluni

Eitt sum fíggjar virksemið hjá Taleban er opiumframleiðslan, og stendur Afganistan fyri nógv tí størsta partinum av heimsins opiumframleiðslu.

Roynt verður at forða hesi framleiðslu við at oyðilieggja grøðina. Hetta gevur sjálvsagt trupulleikar við bøndurnar, sum missa av síni annars lítlu inntøku.

Roynt verður so at fáa bøndurnar at dyrka okkurt annað meira óskaðiligt, men hetta er heldur ikki bert sum at siga tað. Her er stórt sæð bert oyðimørk, og tað er trupult at fáa annað at vaksa her.

Stjórnin í Afganistan er so kroyst av Taleban, at teir av álvara tosa um at fáa samstarv við teir. Tað eru tó tey, sum halda, at hetta kann vera sum at geva illamanni lítlafingur við tí sum tað kann føra til.

Annars er stórur munur á støðuni í Irak og Afganistan. I Irak eru einir 120.000 hermenn. Her er friðarligari nú, og hetta gevur møguleikar fyri irakar sjálvir kunnu yvirtaka verjuna av sínum landi. Tað er eisini ætlanin innan eina áramál at taka allar útlendskar hermenn úr landinum.

Í Afganistan eru nógv færri hermenn, einir 30.000, og her er ætlanin hjá nýggja forsetanum í USA Obama at økja um talið á hermonnum. Tað var jú eisini hiðani at álopið 11.9.2001 var fyriskipað, so her er neyðugt at vera á varðhaldi. Obama hevur annars júst eisini boðað frá, at tað skal gevast størri peningastuðul stuðul til at menna Afganistan og eisini marknaøkini við og í Pakistan.

Tina er heima í Danmark nú. Hon arbeiðir á herstøðini Karup, og býr nærindis. Hon býr heldur ikki langt frá foreldrunum.

Hon eigur tørn at fara aftur til Afganistan í 2011. So er bert at vóna, at støðan verður betri tá enn nú. Sigast kann í hvussu er, at hennara partur liggur ikki eftir.

## Sjeikurin

Tina hevur eisini ein heilt annan vinkul á støðuna í hesum øki. Hon hevur nevniliga ein amerikanskan drong, Dave, sum hon hevur hitt í Afganistan. Hann er ættaður úr San Diego sunnast í Californina.

Men teirra samlív er tó ikki so lætt sum hjá teimum flestu øðrum. Hansara arbeiðstreytir eru eisini at verða sendur til ymiskar uppgávur ymsa staðni á knøttinum. Hann er limur í einum US Marine Corps, sum er ein sereind til serstakar uppgávur hjá herinum.

Beint í hesum døgum er hann umborð á einum amerikanskum flogbera uttanfyri Somalia. Hetta er ikki nøkur jolla. Manningin er 1.200 og teir kunnu hava 40 flogfør umborð. Tað hevur ein nýggj "vinna" tikið seg upp í Somalia, og tað er sjórán. Skip verða rænd og við manning tikin inn til havnir í Somalia. Skip og manning verður síðan afturhildin, meðan samráðingar fara fram um loysipening fyri at lata skip og fólk fara. Her er talan um stórpening, sum skapar vælferð í lokala samfelagnum. Tí eru hesir sjórænarar hetjur heima hjá sær sjálvum. Tær ungu genturnar droyma um at giftast við einum sjórænara!

Men hetta kunnu sjóvinnutjóðirnar ikki finna seg í. Tí eru tær farnar at senda herskip á leiðirnar at verja síni skip. Fleiri lið av sjórænarum eru eisini tiknir og latin teimum londum, hvørs skipum teir hava forbrotið seg ímóti. Nú verður eisini tosað um, at hetta er ein uppgáva fyri NATO.

Men hóast Tina og Dave er so langt frá hvørjum øðrum, so eru sambandið teirra millum gott. Teldubrøvini klikkja inn alla tíðina. Her er sanniliga nógv broytt, síðan Jógvan var til skips, og Brynhild kanska einki frætti ein heilan túr!

Tina roknar kortini ikki við, at tað verður leingi til tey fara at hittast, og hon hevur eisini lovað ommuni og abbanum at koma til Føroyar í summar at vísa teimum sjeikin. Tá fara vit kanska aftur at frætta frá teimum.

## Tillukku til Brynhild

Her skal eisini verða nýtt høvið at ynskja ommuni, Brynhild, tillukku við teimum 80 árunum í morgin 9. apríl. Vit eru so heppin at búgva í sama grannalagi sum Brynhild, so vit síggjast javnan. Sigast kann, at hon er eitt konubrot, og so er hon altíð so stuttlig og positiv. Væl liggur fyri at práta, og skil er eisini í hjá henni!

Brynhild er "ektað" havnarfólk. Mamman Jacobina var úr Kollafirði, men pápin var Fritleif Johannesen, sonur Petur í Mattalág, kendur sum postførari. Hann hevur verið umrøddur í røðini Hendur ið Sleptu. Brynhild er vaksin upp í Konradsbrekku, har hon eisini býr nú.

Brynhild byrjaði í nonnuskúlanum, men ræddist so illa nonnurnar, at hon flutti oman í kommunuskúlan, har Poul Jensen var skúlastjóri. Hon fór úr skúlanum 14 ára gomul, sum vanligt var tá. Táið Brynhild var blivin konfirmerað, fór hon út at arbeiða sum húshjálp hjá skræddaranum Sigurskjold. Síðani fór hon til Íslands 17 ára gomul at arbeiða fisk. Hetta var beint aftan á kríggið, og har var gott at vera.

Brynhild giftist við Jógvan, sum er ættaður heiman av Sandi, og hann hevur koyrt hýruvogn í Havn í nógv ár.

Serliga má takast til ta umsorgan, sum Brynhild hevur fyri soninum Olfert, sum fekk ta óhepnu byrjan á lívinunum, at hann var hildin at vera deyður í móðurlívi, og hann fekk eina føðing eftir tí. Hetta er ein serlig søga, sum var í FF-blaðnum fyri nøkrum árum síðani.

Sum sagt er tað altíð hugnaligt at hitta Brynhild. Tað var líka hugnaligt at hitta Tinu. Ynskt verður teimum báðum og teirra einar gleðiligar páskir.

***Miðvikan var vegna páskirnar í blaðnum í gjár týsdagin***



*Úti á bygd*



*Afganskar kvinnur í burka*



*Kjøtmarknaður í Afganistan*



*Kabul frá luftini*